LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Til Løgtingsins fíggjarnevnd,
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
100 Tórshavn

J.nr. 1035-005/16

Tinganes, 12. november 2018

**Viðv. spurningum frá fíggjarnevndini í sambandi við viðgerð av uppskoti til løgtingsfíggjarlóg 2019 (Lm. nr. 47/2018 hj/ód)**

Fíggjarnevndin hevur sett løgmanni nakrar spurningar viðvíkjandi uppskoti til løgtingsfíggjarlóg 2019.

## Frávik í mun til játtanarkarmar fyri 2019

Fíggjarnevndin spyr um frávik á løgtingsfíggjarlógini í mun til samtyktar játtanarkarmar.

Viðvíkjandi grein 2 er uppskot til løgtingsfíggjarlóg í samsvari við løgtingssamtykt nr. 143/2017 um játtanarkarmar, tó við teirri broyting, at játtanin til Føroya Kærustovn er hækkað í sambandi við yvirtøku av familjurættarliga økinum á ólavsøku 2018. Í sambandi við fíggjarlóg fyri 2018 lá ein partur av kostnaðinum eftir, sum varð játtaður sum eykajáttan (Lm. Nr. 18/2018) í oktober 2018. Í 2019 er henda hækking í játtanini til Kærustovnin framskrivað til fult fíggjarár.

## Framskrivingar av høvuðskontum

Fíggjarnevndin biður um eitt yvirlit yvir framskrivingar við prís- og lønarvøkstri, umframt afturhald. Hetta er sett upp í talvu niðanfyri. Til talvuna er at siga, at fyri allar høvuðskontur á grein 2 er lønarframskriving løgd inn svarandi til 2.5% umframt arbeiðsgevarakostnaðin av pensjónsnýskipanini, sí tó viðmerking niðanfyri. Einki er sett av til prísvøkstur.

Fyri Føroya Kærustovn umfatar framskriving av lønum eina bundna raðfesting frá 2018 (sí undanfarnu yvirskrift) umframt vanligar lønarhækkingar. Fyri Dátueftirlitið er ein uppraðfesting við 400 tkr í 2019 sum er bundin raðfesting til eitt heilt ársverk í 2020. Fyri løgmann og landsstýrið er sett av til bíðiløn í sambandi við at val skal vera í 2019.

Fyri Løgmansskrivstovuna er enn sum áður ein partur av játtanini til felagsfyrisiting í Tinganesi, sum tekur sær av nøkrum felags funktiónum fyri øll ráðini. Ein partur verður fíggjaður við flyting millum tey ráð, sum eru felags um nakrar funktiónir.

Tinganes • FO-100 Tórshavn • Faroe Islands
Tel: +298 306000 • Fax: +298 306015 • e-mail: lms@lms.fo • www.lms.fo

| Høvuðskonto | Játtan 2018 | Uppraðfesting | Framskriving lønir | Sparing | FLU 2019 |
|---|---|---|---|---|---|
| Løgmansskrivstovan | 15.013 | 0 | 366 | 43 | 15.232 |
| Umbygging Tinganes | 2.700 | 0 | 0 | 700 | 2.000 |
| Løgmaður og landsstýrið | 7.941 | 0 | 1.002 | 0 | 8.943 |
| Norðurbryggjan í Keypmannahavn | 300 | 0 | 0 | 0 | 300 |
| Lógarmál, ymsar útreiðslur | 520 | 0 | 0 | 80 | 440 |
| Studningur til politiskt virksemi | 4.800 | 0 | 0 | 0 | 4.800 |
| Føroya Kærustovnur | 7.238 | 0 | 917 | 15 | 8.140 |
| Endurgjald til brotsverksoffur | (netto) 0 | 0 | 0 | 0 | (netto) 0 |
| Dátueftirlitið | 2.045 | 400 | 0 | 0 | 2.445 |

**2.11.1.21 – Umbygging í Tinganesi**

Fíggjarnevndin spyr, hvussu gongur við umbygging Tinganes. Her er at siga, at Sethúsini eru liðug og klár at flyta inn í. Ætlanin er at Fiskimálaráðið skal flyta inn í Sethúsini, men av tí at tey hava sera nógv at gera í Fiskimálaráðnum beint nú, hava løgmaður og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum avtalað at útseta flytingina til árskiftið 2018/2019.

Síðani spyr fíggjarnevndin um ætlanina at savna øll stjórnarráðini í Tinganesi ella á Tinganesleiðini. Tá Fiskimálaráðið er flutt inn í Sethúsini í Tinganesi, eru trý ráð eftir, sum ikki halda til á Tinganesleiðini. Løgmansskrivstovan hevur fingið arkitekt at gera skitsutekningar yvir, hvussu nakrir bygningar á Tinganesleiðini kunnu verða brúktir til hesi trý stjórnarráðini, um teir gerast tøkir. Fleiri møguleikar eru, alt eftir hvørjir bygningar møguleiki verður at fáa hendur á, og í løtuni verður arbeitt við at kanna hetta nærri. Fyri at ætlanin kann eydnast, er m.a. neyðugt, at vit fáa neyðugu fíggingina til vega.

At enda spyr fíggjarnevndin um ætlanina viðvíkjandi Evensens pakkhúsi. Hesar ætlanir eru ikki meira ítøkiligar nú enn fyri einum ári síðani. Annars hava vit, áðrenn tað, fingið gjørt eina skitsu av, hvussu Evensens pakkhús kann verða innrættað til móttøkur, samráðingarhølir, verkætlanararbeiði og fyrilestrasal til alla landsfyrisitingina at brúka. Henda ætlan er nú ein av fremstu raðfestingunum í heildarætlanini fyri Tinganes.

Vinarliga

Flóvin Eidesgaard,
búskaparráðgevi